# Tað hanga ikki allir ly

Tit eru tilfeingið. Høvdið á tykkum og øllum okkara ungdómi er ressourcan. Ikki fyrrenn hendan kreddan fær virknað, er vón fyri einum sjálvberandi búskapi og eini tjóð, sum stendur uppi av sær sjálvari segði Tórbjørn Jacobsen, tingmaður í røðu síni á pisufundi á Tvøroyri á Jóansøku. Vit prenta røðuna



*Suðuroy eru nú floygdar. Mentar í eini bráðpannu í Suðuroy, sum gevur tykkum allar møguleikar frameftir. Búnaðar í einum skúla, sum eisini hevur givið ein kollosalan socialan synergi segði Tórbjørn Jacobsen, tingmaður í røðu til pisurnar á Jóansøku.*

*tórbjørn jacobsen*

Martýrur. Eg? Avgjørt ikki ! Tí einki, hvussu mótstøðan hevur verið, er komið longur enn at skinninum. Eg havi ikki verið illur við mann heilan dag. Eg haldi, eg havi verið ov dovin til at ganga við hatri. Men eg havi ikki latið aðrar vikað meg frá mínari meining. Eg havi hildið fram eftir míni egnu leið, tí eg havi altíð verið vísur í, at eg var tann besti.

So bersøgin og opinskáraður var Pól F. táið hann fór um sjeytiára hvarvið. Yrkjarin, ið fjakkaði frá tí eymasta til tað harðasta, frá tí stillasta til tað villasta, frá tí mest viðkvæma til tað djarvasta, sum var sparringspartnari hjá fleiri ættarliðum, sum átók sær herskna leiklutin, at perspektivera tjóðina í andaligum, mentanarligum og politiskum viðurskiftum og sum upplivdi tann stórleika, at bøkur hansara vóru brendar, av fávitsku, sjálvsnøktan og býttleika, heilsaði einaferð studentunum í Hoydølum soleiðis:

*Varðveitið fedranna mentan og*
*mál,*
*og dugið at velja og vraka,*
*úr nútímans útlendska hurlivasa*
*hitt fremsta úr heimsmentan*
*taka.*

*Tit eru jú Føroya álit í dag,*
*tí missið ei fótafestið,*
*til andalig skrobbein sum*
*geykaungar,*
*á flatlondum verða teir flestu.*

Hargaskaldið, sum mesta av ævini búði úti í Froðba, krøkti seg so fastan í føroyska mentanararvin, at hann doyr ongantíð. Aðrir djúptonktir litteratar hava havt støð í Suðuroy. Stóri prosamaðurin Martin Joensen, sum Magnus á Kamarinum tók til, hevði bæði beinini plantað í ídnaðarsamfelagnum, har hann luttók sum arbeiðsmaður, fiskari, lærari og rithøvundi. Ósentimentalur, tó við kenslum, við viti og frálíkum hegni, viðgjørdi hann sína samtíð í skaldsøguformi. Hann var ikki keipumyndari, speirak og spottaði ikki. Var heldur ikki spoyskur. Lýsti bara so sera beinrakið og vitborið samfelagsviðurskiftini í síni egnu samtíð. Tað var hansara styrki. Og norðuri í Leirum sat einaferð eitt forsligið høvd, sum heldur ikki var kálvføddur við grælingafjarðum. Úrmælingur við penninum. Lýsingarnar av ferðum hansara eru í heimsklassa. Kristian Osvald Viderø. Á ferðini til Jorsala var hann til eina lítið unnuliga guðstænastu í Durham. Tað tøktiskt honum sum stóðu tveir prestar á prædikustólinum. Onki samljóð var ímillum veip-ingarnar og sálina. Hann minti mest um eina prentmaskinu, sum í gjaldtrotatíðum prentar seðlar, sum ongin borgan er aftanfyri. Seinri vitjaði hann vicarium Dei - sjálvan pávan í Roma, og á somu ferðini rak hann framvið Oljufjallinum og gekk seg fram á spádómarnar hjá Jeramia, um at "frá Oljufjallinum skal boðskapur ganga út, sum menn skula fegnast av at hoyra."

Boðskapurin kom frá kendum andsmenni, sum legði botnin undir siðmenningina vestanfyri og í stórum parti av heiminum. Undir viðtøkurnar hjá Sam-eindum Tjóðum. Ein moralskur, etiskur og sosialur byltingarmaður. Besta prógvið um, at skroypiligir mýruvongir, materiunnar trælir, hvørki við sáplum, riflukúlum ella naglum á krossinum megna at steðga ávirkanini frá halgimonnum, teimum andaligu tíansheldur teimum politisku. Í kendu fjallaprædikuni, sum er átøk einum manifesti, lýsir hann bersøgið, hvørji tey sælu eru, síðani slær hann fast við sjeytummaseymi: "Tit eru salt jarðarinnar; men um alt saltið dovnar, hvørjum skal tá verða saltað við? Tað dugir onki longur uttan at verða blakað út og traðkað undir mannafótum." Síðani koma orðini: "Tit eru ljós heimsins." Og illani slepst undan staðfestingini: "Eygað er ljós likamsins. Er tí eyga títt frískt, verður alt likam títt ljóst."

Og nú standa vit her á Tvøroyri og heiðra hesum føgru blómunum, ið eru sprotnar úr føroyska miðnámsverkinum. Eftir skiftandi rák, gongutúrar í dimmum dølum og gevandi frælsi í mjúkligum líðum, er sinnisstøðan euforisk, soleiðis eigur løtan at vera, táið mikið starv og stríð hevur flutt teg fram á næsta løðarsteinin í lívinum. Ment og gjørt teg ferðabúnan til næsta leikin í talvinum. Og nú velst alt um kærleika, trúgv og vón. Hornasteinarnar. Nú ræður um sálarstyrkina hjá Pól F., sannføringina um egnan mátt, um at peila av og stinga gradistokkin í jørðildi, sum socialrealisturin Martin Joensen og at síggja allan heimin sum ein møguleika - á sama hátt sum kosmopolitturin Kristan Osvald Viderø. Tit eru salt jarðarinnar, ljós heimsins og eygu tykkara ljós likamsins.

Tilfeingið er nógv brúkt orð í tíðini. Og ymiskt er hvussu hugsað verður um hetta hugtakið, og eisini um hvørt høpið tað verður sett í. Líka relativt sum alt annað í lívsins litbroti. Líka so litríkt sum gleivandi ælabogin, ið er burtur áðrenn tú varnast. Og oftani eitt so misskilt hugtak, at tú sært ríðini av skammlopum glampa handan skallabeinini á fólki.

Í Føroyum tykist tað, sum um onki annað tilfeingið er, enn hesir stertarnir, ið higartil hava verið so kræsnir, at teir hava ikki bitið á blekksprutturnar úr Suðuríshavinum og tey fáu tandrini, ið hava megnað at smogið sær undan trolgapunum táið bobbensirnar fara dansandi eftir landgrunninum, og so teir, ið enn ikki hava vilt seg inn á avhegnaðu havleiðirnar vestanfyri. Hetta er eftirhondini vorðið ein psykosa. Ein fella. Higartil hevur totali intelligensurin í landinum start seg blindan í tilfeinginum, ið svimur á landgrunninum og donsku ríkisveitingina. Ein buffari sum er viknaður, men framvegis doyvir framsøknið og blindar eyguni fyri møguleikum, ið sjálvandi høvdu flutt fokusið, um definitiónin av hugtakinum tilfeingið var snarað ein hálvan sólarring.

Tit eru tilfeingið. Høvdið á tykkum og øllum okkara ungdómi er ressourcan. Ikki fyrrenn hendan kreddan fær virknað, er vón fyri einum sjálvberandi búskapi og eini tjóð, sum stendur uppi av sær sjálvari. Vit hoyra nú aftur ávaringarnar frá ICES. Samfelagið fer nærum í coma. Ár undan ári. Vælferðin stendur og fellur við tilgongdini í fiskastovnunum. Og soleiðis verður lagið, um broyting ikki kemur í, og mál verða sett fyri hvussu vit koma okkum burturúr hesum trauma, at tað ið svimur á føroyskum havleiðum avgerð lív og lagnu fólksins. At náttúruviðurskifti og skiftandi veiðitrýst skal vera regulatorurin í møguleikum og menning.

Føroyar eru onki eindømið í so máta. Hetta er regulin heldur enn undantakið. Heil meginlond liggja lamin av hesum og av ongari vinnupolitiskari stýring. Afrika, Latínamerika og allur hin gamli eysturblokkurin.

Tilfeingið, útbúgving og vælferð. Hesi orðini hanga neyvt saman. Og søgan vísir okkum, at útbúgvingarmøguleikar og vælferð hanga proportionalt saman. Harvið er eyðvitað hvar tilfeingið liggur. Hjálandaveldið okkara, Danmark, er kanska heimsins besta dømi um, hvussu tað kemst burturúr eini tilfeingisfellu. Tvs. burturúr einoygdu fatanini um, at natúrligu ressourcirnar, ið hoyra landinum til, eru einastu lunnindini, ið